Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Søgu- og samfelagdeildin
Department of History and Social Sciences

# Skeiðslýsing Heyst 2018
## *Course description*

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | 2143.16 |
| **Heiti**<br>***Title*** | Politisk ástøði og idesøga<br><br>*Political Theory and History of Ideas* |
| **ECTS**<br>***ECTS*** | 10 ECTS |
| **Fortreytir**<br>***Prerequisites*** | Tey lesandi skulu hava miðnámsútbúgving ella samsvarandi førleika.<br><br>*Secondary education or equivalent qualifications.* |
| **Stig**<br>***Level*** | Bachelorskeið.<br><br>Kravskeið á bachelor í Politikk og umsiting og í Søgu. Valfrítt á Sosialvísind og samfelagsplanlegging. Stakskeið (gjald).<br><br>*Bachelor. Obligatory for students in Politics and Administration. Optional choice in History and in Science. Single course (fee applies).* |
| **Endamál**<br>***Purpose*** | Endamálið er at geva teimum lesandi holla fatan av politiskum ástøði og idesøgu síðan Platon og fram til í dag.<br><br>*The course will give the student an overview of, and insight into, main concepts in political thought from Plato to today.* |
| **Innihald**<br>***Content*** | Hvussu er frægast at innrætta samfelagið? Hvat er fyrimunurin við einari demokratiskari skipan í mun til eitt nú einaveldi? Platon var skeptiskur yvir fyri báðum, og Churchill helt speiskur, at demokratiska skipanin er tann ringasta av øllum undantikið allar aðrar stýrisskipanir, sum hava verið royndar upp gjøgnum tíðina. Spurningurin um, hvussu frægast er at skipa seg, hevur upptikið heimspekingar yvir 2500 ár. Vit liva í einum heimi við nógvum politiskum |

| | |
|---|---|
| | skipanum, og spurningurin vil helst stinga seg upp, so leingi menniskju liva saman í felagsskapi.<br><br>Í hesum skeiði verður greitt frá, hvørjir høvuðs persónarnir í politiskum ástøði og idesøgu hava verið upp gjøgnum tíðirnar fram til í dag. Nakrir av teimum teoretikarunum, sum verða lýstir, eru Platon, Aristoteles, Locke, Hobbs og Rawls (undirvísarin ger endaligan lista).<br><br>*What is the best way to organise a society? What are the advantages of a democratic system compared to a dictatorship? Plato was sceptical about both systems and Churchill thought that democracy was the worst of all political systems, except for all other political systems. The question about how to best organise society has occupied philosophers over 2500 years. We live in a world with many political systems and the question will most likely re-emerge as long people live together in a community.*<br><br>*In this course the student will learn about the key thinkers in political thought throughout history. Some of the key thinkers explored are Plato, Aristotle, Locke, Hobbs, and Rawls (the lecturer decides on the final list).* |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Skeiðið er 30 tímar tilsamans. Undirvísingin er sett saman av fyrilestrum undirvísarans, umframt aktivari luttøku frá teimum lesandi.<br><br>*The course (30 hours in total) consists of lectures and active student participations in class.* |
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Tey lesandi skulu:<br><br>• Vita hvørjir høvuðspersónarnir eru innan politisk ástøði, herundir nær teir/tær hava livað, og duga at greiða frá høvuðslinjunum í tí søgu- og samfelagsliga samanhanginum (søguliga kontekstinum), rithøvundarnir hava liva í. |

| | |
|---|---|
| | • Duga at greiða frá høvuðstankagongdini hjá teimum ástøðingunum, sum hava verið viðgjørdir í skeiðnum.<br><br>• Sjálvstøðugt at viðgera og greina týdningin av politisku hugsanini hjá hesum ástøðingunum fyri samtíðina.<br><br>*The student shall:*<br><br>• *Know the names of the key thinkers in political thought, when they lived, and the historical background and circumstances (context) they lived in.*<br><br>• *Be able to explain the main ideas and main lines of reasoning in the political thinking of the studied authors.*<br><br>• *Independently describe and analyse the importance of selected political thinkers for contemporary society.* |
| **Próvtøkuháttur**<br>***Assessment method*** | Munnlig próvtøka við 30 min. fyrireikingartíð. Pensum, egnar notur og annað tilfar frá undirvísingini er loyvt at hava við í fyrireikingarhølið.<br><br>*Oral exam with ½ hour preparation. It is permitted to bring all course material from the course and ones own notes into the preparation hall.* |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Uttansetursprovdøming.<br><br>*External examination.* |
| **Próvtalastigi**<br>***Marking scale*** | 7-talsstigin.<br><br>*The 7-Point Marking Scale.* |
| **Lestrarlisti**<br>***Bibliography*** | Umleið 800 síður.<br><br>*Aproximately 800 pages.* |
| **Ábyrgd**<br>***Contact*** | Jógvan D. Hansen |